

# Dagstovnurin á Argjum 20 ár

Í sambandi við at Dagstovnurin á Argjum fylti 20 ár tann 17. oktober, verður opið hús á stovninum fríggjadagin 24. oktober. Dagstovnurin á Argjum lat upp 17. oktober 1988, men av tí at heystfrítíðin var tann 17. oktober, so verður dagurin hildin nú fríggjadagin 24. oktober. Dagstovnurin á Argjum, sum er ein sjálvsognarstovnur, er broyttur nógv hesi 20 árini. Á stovninum ganga 74 børn í aldrinum 1 til 7 ár. Frá at vera 4 stovur við 16 børnum, eru í dag 6 stovur. 2 vøggustovur við 10 og 12 børnum, 3 barnagarðsstovur við 12 børnum í hvørju stovu og eina forskúlastovu við 17 børnum. Í sambandi við 20 føðingardagin verður opið hús á stovninum frá kl. 15.00 til 17.00 fríggjadagin, har øll eru vælkomin.

# j æru á útoyggj



*Mikkjal Joensen á Trøllanesi fæst við jarnsmíð og verður nú ein partur av verkætlanini Economusée. Miðað verður eftir at luttøka hansara skal bera seg fíggjarliga, skal fáa ferðafólk til Føroyar og Trøllanes, samstundis sum vit gera okkara til at eitt gamalt handverk verður varðveitt*

Mynd: Jens Kristian Vang

*Talan er um eitt sera profesjonelt tiltak, har tann vitjandi og ferðamaðurin fær eina veruliga uppliving av einum gomlum, men kortini livandi og sjónligum handverki. Hvørt einasta ár vitja 700.000 fólk á teimum 50 verkætlanunum, sum eru settar í gongd í Kanada*



*Í heyst vóru fýra umboð úr Føroyum í Quebec í Kanada, har tey fingu sjón fyrisøgn at ein slík verkætlan sum Economusée kann gerast eitt gott ískoyti hjá mongum. Á myndini eru føroysku umboðini - Olga Biskopstø úr Syðrugøtu, Jona í Lon av Húsum, Mikkjal Joensen av Trøllanesi og Esbern í Eyðansstovu úr Mykinesi*

framsýning, og haraftratein ætlan um at gera hetta virksemið sjónligt í gerandisdegnum.

- Tey sum luttaka fara at vinna pening, samstundis sum tey eru við til at varðveita bæði tað siðbundna handverkið, men eisini tann søguliga og mentanarliga partin, sigur Útoyggjafelagið.

Ein annar aðaltáttur í verkætlanini er nýskapan ella innovasjón, sum tað eitur á fakmáli. Við hesum er ætlanin at menna nýggjar vørur og framleiðslur.

Longu nú er greitt, at tey bæði virkini sum verða sett á stovn í Føroyum koma at luttaka eftir hesum leistinum.

- Vit eru enn á byrjunarstøði, men okkara vón er kortini at her fer okkurt munagott at spyrjast burturúr, sigur Olga Biskopstø.



*Judith Johannesen hevur verið góður lærumeistari hjá teirri ungu Sunrid í Gong. Nú fara tær báðar at samstarva um myndatøku og sølu í Fotomiðstøðini í Saltangará*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Nýtt andlit til nýggj andlit

**Saltangará:** Eftir at hava lært til fotograf fer Sunrid í Gong nú at yvirtaka myndatøkurnar sjálvar hjá Fotomiðstøðini í Saltangará.

Hon varð útlærd sum fotografur 31. august, og hevur nú í samstarvi við lærumeistara sín, Judith Johannesen avgjørt at víðka nakað um virksemið:

Hereftir kemur Judith sjálv at standa fyri søluni í handlinum, meðan Sunrid fer at taka sær av myndatøkunum.

- Eg havi tikið nógvar portrettmyndir, og tað komi eg framvegis at gera, sigur Sunrid.

Hon hevur longu prógvað góðu evni síni sum fotografur á heimasíðu sínari – www.sunrid.com, men hevur hon eisini hesi seinastu árini lært at taka myndir av modellum, sum eru vælegnaðar til lýsingar hjá føroyskum fyritøkum.

Í sambandi við broytta virksemið í Fotomiðstøðini verður móttøka leygardagin, har fólk eru vælkomin inn á gólvið at heilsa uppá tær báðar, Judith og Sunrid millum klokkan 11 og 14:30.

**sb.**

# Valravn og Mute-Comp bestu sýning í Cairo

**Tónleikabólkurin Valravn við millum øðrum føroysku Onnu Katrin Egilstrøð, vann saman við Mute Comp prísin fyri bestu sýning á sjónleikafestivali í Cairo fyri stuttum**

LIST
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

The 20th Cairo International Festival For Experimental Theatre 2008 var í døgunum frá 11. til 20. oktober.



Danska mentaráðið sendi Valravn og Mute-Comp til Egyptalands at umboða Danmark við dansi, sjónleika- og tónleikasýningi Grasping The Floor With The Back Of My Head.

Leikbólkar úr 45 londum tóku lut, m.a. úr Yemen, Kazakhstan, Jordan, Brasilia, Irak, Egyptalandi, Italia, Kina, Frakalndi og USA.

71 sýningar vóru spældar í nevndu døgum og sýningin við Mute-Comp og Valravn, har Anna Katrin Egilstrøð er við, vann heiðurin fyri bestu sýning í 2008.

Sýningin hevur áður verið innstillað til Reumert virðisløn og á Dublin Frindge Festival bleiv sýningin innstillað til bestu sýning.

Til ber at síggja brot av sýningini á YouTube ella á myspacesíðuni hjá Valravn.